gult22 cyan22 magenta22 svart22

Ljómur og Gøta/Leirvík syngja The Crucifixion

KÓR

Dagfinn Olsen

Fyri tveimum árum sí›ani framførdi Kirkjukóri› Ljómur úr Vági The Crucifixion. Eitt kórverk um Jesu pínslusøgu.

Tá var hetta vi› stu›li frá 8 donskum sangarum. Ljómur hevur seinu árini havt donsku Dorthe Tilma, sum lei›ara. Hon vitjar regluilga, og venur kóri›. Nú er samstarv fingi› í lag vi› Felagskóri› Gøta/Leirvík, so um páskirar fara 45 føroyskir kórsangarar at framføra verki›.

Verki› krevur luttøku av fermum urguleikara, og eins og fyri tveimum árum sí›ani, situr sonur Dorthe, Christian Tilma, vi› urguna, tá verki› í ár ver›ur framført.

Arbeitt hevur veri›, og ver›ur, støugt vi› at menna framførsluna av verkinum. Til framførslurnar um páskirnar, ver›ur ætlandi ein umseting av innihaldinum løgd inn í konsertskránna, so áhoyrarin betri kann fylgja vi› søgugongdini.

Talan er um kórverk, i› eisini inniheldur solosang. Skráin er, at hvørt kór syngur eitt sjálvstø›ugt verk, umframt The Crucifixion. Gøta/Leirvík syngur Ur nái Gu› mín, vi› lag eftir Esmar Jacobsen. Ljómur syngur Beati Mortui eftir Bartholdi. Eisini er á skránni Nú nemur náttin frí›.

The Crucifixion er skriva› til framførslu Langa Friggjadag. Hetta er kendasta verk hjá bretanum Steiner, i› hevur veri› heldur ókendur og undirmettur. Men The Crucifixion hevur tryggja› honum sess í enskari kórmentan.

Verki› var› framført fyrstufer› í februar í 1882. Tónasmi›urin var tá 46 ára gamal, og ein av størstu tónleikarum innan kirkjutónleik. Ikki var hann serliga kendur sum tónasmi›ur, men fekst nógv vi› at leggja tilrættis. Stórt sæ› skriva›i hann bert 4 stór oratoriir, The Crucifixion var ta› seinasta.

Ári› eftir, at hann skriva›i verki›, var› Steiner hei›ra›ur sum a›al, og eitt ár seinni gjørdist hann professari í tónleiki í Oxford.

Hann doy›i í 1901, bert 61 ára gamal, men The Crucifixion bar navn hansara ví›ari.

Ljómur og Gøta/Leirvík fara at framføra The Crucifixion um páskirnr. Tann 11/4 20:00 ver›ur konsert í Vági. Skírisdag klokkan 16:00 ver›ur konsert í Gøtu. Sama dag ver›ur konsert í Vesturkirkjuni í Havn.

Fyrireikandi málundirvísing

Ta› frættist í›iliga frá (skjalvátta›um) royndum, har næmingar í sta›in fyri ávís kravd fremmandamál fyrstu tí›ina av skei›inum heldur læra esperanto og sí›an ta› kravda fremmandamáli› (t.e. harvi› læra fremmandamáli› styttri tí› enn javnlíkar teirra). Vi› skúlalok duga tá esperantonæmingarnir sum heild fremmandamáli› betur enn hinir, tó at teir hava lært ta› í styttri tí›. Hetta kann í fyrsta umfari tykja løgi›, men er ikki so løgi› kortini: Í esperanto fæst ein einføld, men gjøllig fatan av almennum málbygna›i (mállæru) og av somu or›lutum, i› ganga aftur í ymiskum málum, og sum onnur vi› strí› og strev lutvíst læra vi› at lesa latín (og grikskt). Henda málsliga fatan gongur aftur, tá i› fremmandamálini skulu lærast. Tá fatar næmingurin samanhangi› millum 'par-at', 'ap-parat' 'preparat', 'prepar-ant', millum 'de-pend', 'kom-pendium', 'ap-pend-iks' og 'pend-ul' og anna› slíkt.

Vi› ey›sædda skilvísa bygna›inum í esperanto lærir tú eisini at geva tær far um bygna›in í tínum egna mó›urmáli eins og í fremmandamálum.

Í 1992 kom út í Rotterdam á enskum, esperanto og fronskum ein bóklingur um royndirnar vi›, hvat vir›i i› esperanto hevur í fyrireikandi málundirvísing, Edward Symoens: Al nova internacia lingvopolitiko: La propedeutika valoro de Esperanto. William Auld hevur ummælt ta› í danska tí›arritinum Esperanto-nyt 2/1999, her stutt endurgivi›:

Kunna› ver›ur um 15 royndir millum 1918 og 1988. Helmingin av royndunum hava vísindafólk gjørt, ella tær eru skipa›ar undir stjórnareftirliti. Hinar royndirnar vóru eisini undir hampiligum eftirliti.

Í 6 av royndunum var› bori› saman vi› ta› at læra onnur mál, og alt eftir,



hvussu torfør hini málini vóru, var esperanto upp í 15 fer›ir lættari at læra enn tey.

10 av royndunum vóru m. a. at kanna, hvat vir›i i› esperanto hevur í fyrireikandi málundirvísing, vanliga solei›is, at ein flokkur lærdi esperanto, me›an ein annar flokkur byrja›i vanliga fremmandamáls-undirvísing, t.d. í fronskum; næsta ár byrjar so esperantoflokkurin vi› fronskum. Eftir 3 árum ver›ur bori› saman, hvat bá›ir flokkarnir duga í sama fremmandamálinum, sum esperantoflokkurin sostatt bert hevur havt í 2 ár.

T‡›iligt var, at teir næmingar, i› fyrst hava lært esperanto, hava lættari vi› at læra onnur fremmandamál, og harafturat var› greitt, at esperantonæmingarnir eftir bert 2-3 árum t.d. í fronskum dugdu betur enn hinir, sum høvdu havt franskt í 3-4 ár.

Vi› tí einfalda bygna›inum í esperanto er lætt at ogna sær grundleggjandi almenna mállæru; skjót og gó› úrslit og so ta›, longu eftir fáum mána›um at byrja brævaskifti vi› onnur børn úti í heimi, alt virkar tilelvandi.

Jeffrei Henriksen

SÁMALAND. Mari Boine úr Sámalandi syngur saman vi› russisku Innu Zhelannay og Sergey Starostin á n‡ggjari fløgu, sum kenda t‡ska plátufelagi› Jaro gevur út

Boine á Jaro

TÓNLEIKUR

Birgir Kruse

Sámiska sangarinnan Marie Boine er frammi vi› n‡ggjari fløgu, sum plátufelagi› Jaro gevur út. Hetta felag er millum tey fremstu, i› fáast vi› sonevndan world music. Ta› er fólkatónleikur, sum umframt at ver›a bæ›i si›- og sta›bundin, eisini er n‡skapandi og endurspeglar rák, sum eru í nútí›ar rútmiskum tónleiki.

Eitt hitt besta aktuella dømi um føroyskan tónleik av hesum slagi er bólkurin Ivory. Og undan teimum bólkurin Enekk.

N‡ggja fløgan vi› sámisku Mari Boine rópast Winter in Moscow og er longu komin á top 10 listan yvir mest spældu fløgur hjá evropeisku útvarpssto›unum, sum rópast World Music Charts Europe. Dagliga kann hesin listi lesast á www.wmce.de

Ta› var norski útvarpsma›urin Sigbjørn Nedland, sum í 1992 fekk samband í lag millum sámisku Mari Boine og russisku Innu Zhelannaya. Hetta ári› hittust sangarinnur í Moskva, har ið upptøkurnar, sum eru gjørdar til útvarpsbrúk, stava. Tær eru nú tøkar hjá almenninginum á hesi n‡ggju Jaro-fløgu.

Sí›ani hesar áhugaverdu "live" upptøkur vóru gjørdar, er so mangt hent. Sámiska Boine gjørdist kend vi› sámiskum tónleiki, sum kn‡tti gamla joikin til nútímas ljó›føri og stev, eins og russiska Zhelannaya stovna›i egnan bólk, The Farlanders, sum eisini spælir si›bundnan russiskan fólkatónleik, men vi› avgjørt moderna›um kryddi.

Undan hesum bólki, sang og spældi Inna Zhelannaya í russiska rokkbólkinum Alliance. Seinni medvirka›i hon í plátuni hjá Peter Gabriel "One World", har eisini Marie Boine var› vi›, og í 1996 sang Inna russiskt í Atlanta, tá olympisku summarleikirnir vóru› settir.

Sergey Starostin, sum er vi› í russiska bólkinum The Farlanders, syngur eisini á n‡ggju fløguni hjá Mari Boine. Umframt at syngja og savna vísur, spælir Sergey klarinett og hevur veri› vi› í The Moscow Art Trio.

Á fløguni Winter in Moscow eru 8 sangir, bæ›i russiskir og sámiskir.

gult23 cyan23 magenta23 svart23

Ei›i hevur klára› seg væl gjøgnum kreppuna, sum veri› hevur. Og framtí›in sær ikki so galin út, heldur svenski samfelagsfrø›ingurin Carl-Gustaf Thornström, sum vitja›i á Ei›i í 1973 og var aftur í vikuni

Ta› er liviligt á Ei›i

Carl-Gustaf Thornström leggur dent á, at ta› er tann væl útbygdi infrastrukturirin sum ger, at ta› stendur so væl til á Ei›i, sum ta› ger. Frá tí hann fyrru fer› vitja›i á Ei›i, er fer›ingarti›in úr Havn til Ei›is stytt heilt munandi, eins og fast samband er vi› bæ›i Streymoynna og restina av Eysturoynni. Ta› ger virkismøguleikarnar hjá fólki munandi betri, eins og ta› sjálvandi eisini ger ta› lættari at hava framlei›sluvirki á Ei›i

ØKISMENNING

Edvard Joensen

Útbyggingin, sum farin er fram seinastu 30 árini, hevur gjørt Ei›i til eitt pláss, har avgjørt ver›ur liviligt í framtí›ini, sigur svenskur samfelagsfrø›ingur, sum vitja›i aftur á Ei›i eftir 28 ár.

Svenski samfelagsfrø›ingurin Carl-Gustaf Thornström vitja›i sum lesandi á Ei›i í 1973. Tá gjørdi hann ymsar metingar um, hvussu Ei›i fór at síggja út um aldarskifti›. T‡skvøldi› var hann aftur á Ei›i fyri fyrstu fer› sí›an 1973. Hesafer› saman vi› norskum starvsbró›uri. Teir luttóku á fundi, i› Granskingardepilin fyri økismenning skipa›i fyri sum li› í verkætlanini um økismenning í Føroyum.

Meira fjølbroytt

Carl-Gustaf Thornström leggur dent á, at ta› er tann væl útbygdi infrastrukturirin sum ger, at ta› stendur so væl til á Ei›i, sum ta› ger.

Frá tí hann fyrru fer› vitja›i á Ei›i, er fer›ingartí›in úr Havn til Ei›is stytt heilt munandi, eins og fast samband er vi› bæ›i Streymoynna og restina av Eysturoynni. Ta› ger virkismøguleikarnar hjá fólki munandi betri, eins og ta› sjálvandi eisini ger ta› lættari at hava framlei›sluvirki á Ei›i.

Ta›, at fólk kunnu fara av Ei›i til arbei›is a›rasta›ni, eins og avbygdarfólk koma til Ei›is at arbei›a, fer ikki í grundini lívi› í bygdini, heldur Carl-Gustaf Thornström.

Komandi ættarli› eiga at gagnn‡ta tann infrastrukturur, sum tey undanfarnu hava bygt upp, sigur hann.

Hann vísir á, at ta› er ser ney›ugt at fólk hugsa fjølt‡tt og royna at byggja upp a›rar vinnur enn bara fiskivinnu. Og ta› eru møguleikar á Ei›i fyri slíkum, vísir hann á. Her eru fleiri bygningar, sum saktans kunnu n‡tast til ymsar sonevndar »nichuframlei›slur«, sum ta› ver›ur nevnt. Eitt dømi, hann vísir á, er Tonito, sum ger brævbjálvar.

Carl-Gustaf Thornström vísir á, at føroyingar eru ov fast bundnir at fiskivinnuni. Teir duga ov illa at síggja a›rar vinnumøguleikar enn teir, sum hava vi› fisk at gera.

Sjálvandi ásannar hann, at fiskur er ta› tilfeingi›, vit hava mest av. Men ta› ver›ur ov vandamiki› at grunda at kalla alla okkara tilveru á eina vinnu.

Kunningartøknin er á veg fram vi› risalopum, og hon kennir eingi mørk. Tí hev›i ta› veri› rímiliga upplagt, at eisini føroyingar fingu part av køkuni, heldur hann. Ta› n‡tast ikki at vera tey øgiliga stóru virkini, sum vit skulu hava. Ta› ræ›ur um at hava hugflog og duga at fáa samstarv vi› onkrar størri fyritøku um at gera eitt nú ávísar eykalutir, forrit ella hvat ta› nú kann vera.

-Tú gongur sjálvur her vi› einum digitalum myndatóli og farteldu. Sí›an er ta› bara eitt telefonstikk, sum manglar, og greinin er á Internetinum, vísir hann á.

Partur av landinum

Carl-Gustaf Thornström heldur ta› ikki bera til at samanbera stø›una hjá Ei›i mótvegis restini av Føroyum vi› stø›u Føroya mótvegis Europa.

- Føroyar liggja langt burtur frá meginlandinum. Men Ei›i er komi› so tætt restini av Føroyum seinnu árini, at ta› kann als ikki samanberast, sigur hann.

Hann vísir á, at eisini politiska skipanin hjá bá›um økjunum er ymisk. Ei›i er partur av Froyum og má, hóast ávíst kommunalt sjálvsst‡ri ver›ur, tilpassa seg politiska viljanum í landinum, me›an Heimast‡ri› gevur Føroyum fleiri rættindi og møguleikar, sum ikki skulu gó›kennast í Keypmannahavn.

Eisini í mun til Nor›urnoreg, sum mangan ver›ur samanbori› vi› Føroyar, tá eitt nú útró›ur ver›ur umrøddur, hava føroyingar stórar møguleikar at skapa naka› sjálvir. Í Nor›urnoreg ver›ur ta› mesta st‡rt av eini skrivstovu í Oslo, vísir hann á.

Carl-Gustaf Thornström áleggur føroyingum at gagnn‡ta hesar møguleikar so væl sum gjørligt til egnan fyrimuns. Og hann metir ta› avgjørt vera til okkara fyrimuns, at Føroyar eru uttan fyri ES.

Framtí›in

Framtí›armøguleikarnar á Ei›i metir svenski samfelagsfrø›ingurin rímiliga gó›ar.

Hann fegnast um, at bygdin er so nógv vaksin, sí›an hann var her seinast. Bæ›i sethús, virkisbygningar, skúlaútbygging og ítróttarhøll, hevur hann merkt sær.

Hann roknar vi›, at fólk fara at fáa sær útbúgving. Og útbúgving kann brúkast allasta›ni. Ta› er ikki beinlei›is ney›ugt at arbei›a á sta›num, har ein b‡r - ella umvent - tí samfer›slumøguleikarnir eru so gó›ir í dag. Fólk fara eisini í framtí›ini at koyra til arbei›is a›rasta›ni, me›an onnur koma hendanveg.

Carl-Gustaf Thornström metir, at framtí›in fer at síggja meira av »sekundervinnu« á Ei›i. Fiskivinnan ver›ur avmarka› til flakavirki›, sum er, me›an tænastuvinnan fer at hava framgongd, heldur hann.

Ta› eigur at bera til at fáa naka› væl meira burtur úr fer›avinnuni í Føroyum, enn vit gera í dag, er hansara meting. Og á Ei›i sær hann rættiliga gó›ar møguleikar. Og hóast eitt nú fer›avinnan á Ei›i bara er fult virkin í trígjgar mána›ar um ári›, eigur ta› at bera til at markna›arføra hana solei›is, at hon kann bera seg.

-N‡ti› náttúruna, sigur hann avgjørdur. Hon er rein. Hon er stórsligin, og luftin er frísk.

Sum partur av fer›avinnuni kann Ei›i gerast gott sta› at halda eitt nú rá›stevnur, sigur Carl-Gustaf Thornström, og vísir aftur til júst náttúruna her nor›uri, sum hann er sera hugtikin av.

Men ta› krevur eisini sosialar ágó›ar at fáa folk at ver›a búgvandi í eini bygd sum Ei›i. Tí er eisini ney›ugt, at fólk fáa atgongd til tílikt sum konsertir, ítróttartilbo›, kvøldskúlar og slíkt, sum frítí›in kann brúkast til vísir svenski samfelagsfrø›ingurin á.

Men eingin framtí› er, uttan fólk trúgva upp á hana. Og trúnna upp á framtí›ina metir Carl-Gustav Thornström avgjørt, at ei›isfók hava.

Ta› grundar hann á tann væl útbygda infrastrukturin, sum hann avgjørt ikki heldur hev›i veri›, um tey, sum bygt hava út, ikki trú›u upp á ta›, sum tey gjørdu.



Svenski samfelagsfrø›ingurin Carl-Gustaf Thornström vitja›i sum lesandi á Ei›i í 1973. Tá gjørdi hann ymsar metingar um, hvussu Ei›i fór at síggja út um aldarskifti›…

…hesafer› saman vi› norska starvsbró›urinum, Ottar Brocks. Teir luttóku á fundi, i› Granskingardepilin fyri økismenning skipa›i fyri sum li› í verkætlanini um økismenning í Føroyum